# Gull-piltar

**Fyri tveimum vikum síðani varð finaluumfarið hjá piltunum leikt, og vinnarar gjørdust EB/Streymur. Vit hava fingið hesa myndina av gull-piltunum sendandi**



*Standandi frá vinstru: Andras Tórason Jacobsen, Bjørn Bjarnason, Leo Joensen, Hans Egil Trúgvason Egholm, Andrias Poulsen og Sorin Anghel, venjari. Húkandi f.v. Dávur Johannesen, Fróði Wang, Fríðrikur Højsted, Ólavur Ejdesgaard og Tordur Magnussen*

# FM-súkklukappingar

## FM-TÍÐARSÚKKLING

Fríggjakvøldið 28. sept. var 30 km FM- tíðarsúkkling úr Havnini til Kaldbaks og aftur. Tilmeldingin til hesa kappingina var heldur størri enn til býarsúkklingina ónskvøldið, sjálvt um veðrið ikki var av tí besta.

Tveir nýggir súkklarar vóru við hesaferð. Teir vóru 13 ára gamli Jákup Lútzen, sum í summar keypti sær nýggja súkklu, og nú vildi royna hana, og 17 ára gamli Jógvan Joensen, ið vit best kenna frá svimjing, sum til høvið hevði lænt sær eina súkklu frá TSF. Tórshavnar Súkklufelag hevur keypt sær nakrar súkklur, ið læntar verða teimum,ið vilja royna súkkling, men ikki vilja keypa sær nýggja súkklu, fyrr enn tey eru heilt vís í at súkkling var teirra ítrótt.

**Úrslitið var hetta:**

1. Gunnar Dahl Olsen.
2. Sverri Mohr Edvinson
3. Esmar Joensen
4. Beinir Rasmussen
5. Eli Christiansen
6. Kári Simonsen
7. Jens Sigurd Simonsen
8. Jógvan Joensen
9. Dánjal Michaelsen
10. Jákup. Lútzen

### FM-unglingar
Eli Christiansen.

### FM-menn
Gunnar Dahl Olsen.

### FM-menn 40+
Kári Simonsen.

### FM-100 km

Sunnudagin 30 sept. var so súkklað FM-100 km. Upprunaliga leiðin, ið var tvær ferðir runt Oyggjarvegin og so fýra ferðir á eini rundleið í Havn, bleiv broytt, tí so tjúkt í mjørka var á Oyggjarvegnum. Í staðin var súkklað norður til Norðskála og aftur, og so tríggjar ferðir á 5-km. rundleiðini íHavn.

Sum vanligt fylgdust allir fyrsta teinin, men í tí nógva undanvindinum norðureftir gjørdist ferðin í so høg hjá summum, og í Kaldbaksbotni mátti bárður Huusgaard lata hinar fara, og í Hvalvík mátti Kári Simonsen eisini gera tað sama. Tá ein súkklari soleiðis kemur at súkkla einsamallur, minkar ferðin ein heilan hóp, tí nú er bara hann at stríðast móti vindinum, meðan har fleiri eru at býta hesa uppgávuna er léttari og tað gongur munin skjótari. Gunnar Dahl Olsen, Eli Christiansen og Sverri Mohr Edvinson fylgdust, til Eli ikki megnaði at fylgja við í brekkuni við Sandvíkahjalla, og á rundleiðini niðan Sundsbrekkuna mátti Sverri sanna, at nú vóru kreftirnar gingnar undan, og so kundi Gunnar súkkla einsamallur seinasta partin og fyrstur um málstrikuna.



**Úrslitið var hetta:**

| | 50 km | 83 km | 100 km |
|---|---|---|---|
| 11. Gunnar Dahl Olsen | 1:22:51 | 2:27:31 | 2:56:40 |
| 12. Sverri Mohr Edvinson | 1:22:51 | 2:27:31 | 2:59:05 |
| 13. Eli Christiansen | 1:22:51 | 2:27:31 | 3:02:28 |
| 14. Kári simonsen | 1:28:15 | 2:53:14 | 3:32:51 |
| 15. Bárður Huusgaard | 1:42:15 | 3:06:44 | 3:46:41 |

### Føroyameistararnir vóru hesir

FM-100 unglingar: Eli Christiansen
FM-100 menn: Gunnar Dahl Olsen
FM-100 menn 40+: Kári Simonsen

Við hesari kappingini er so súkkluárið 2001 at enda komið, og samstundis var hetta síðsta kapping hjá Sverra Mohr Edvinsyni, ið gevst, tí sum hann sigur ”aldurin er har”.




## Bókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til bókhalds- og skrivstovuarbeiði.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Kunnleiki til enskt mál er neyðugur.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 19. okt. 2001.**

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
Sp/f nr. 267
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

## Lýsing

**um brævatkvøður og valkort til**

Vegleiðandi fólkaatkvøðu um samanlegging av Skála- og Runavíkar Kommunum, sum verður 8. oktober 2001.

Veljarar í Skála Kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 5. oktober 2001. Tey, ið vegna sjúku ella av aðrari orsøk ikki kunnu koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 441179 í seinasta lagi 5. oktober 2001 kl. 15.00.

Valkort eru send øllum veljarum í kommununi.

Er onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni (tlf. 441179) frá í seinasta lagi 5. oktober 2001.

Skáli 2. oktober 2001
**Skála Kommuna**

## "Gamli gardaveitsla"

**Leygardagin 20. oktober á Hotel Hafnia verður skipað fyri veitslu fyri øllum fyrrverðandi starvsfólkum, sum hava starvast hjá p/f Frants Restorff**

**Kostnaðurin er 225,-.**

**Drykkjuvørur ikki íroknaðar**

**Seinasta freist at tekna seg er 6. oktober hjá Heina Restorff (bakarínum)**
**Marin 313093 ella Benny Ejdesgaard 320400**

frants restorff

## FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

Lutakast um 10.000 kr. verður á Fiskirannsóknarstovuni hóskvøldið kl. 19.00. Eisini verða fyribilsúrslit frá merkingarroyndunum løgd fram. Øll eru vælkomin.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

## Handilslærlingur søkist

Søkt verður eftir handilslærlingi til goymslu okkara, at byrja skjótast gjørligt.
Umsøkjararar við HH ella FHS útbúgving, hava fyrimun.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. okt. 2001.

el-talvuvirkið **í Gøtu sp/f**
512 Norðragøta

## Søluleiðari til frukt- og grønmetisdeildina

Søkt verður eftir søluleiðara til frukt- og grønmetisdeildina, at byrja skjótast gjørligt.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennadi og sjálvstøðugt arbeiði,
- at tú gerst partur av leiðsluni í handlinum,
- rúmar arbeiðsræsur undir ábyrgd,
- lagaligar arbeiðstíðir.

**Vit vænta av tær:**
- ert áhugað/ur í arbeiðinum
- ert kundavinarlig/ur,
- ert álítandi og reiðilig/ur,
- hevur evnir og áhuga í at selja vøruna,
- kanst taka av skiftandi avbjóðingum,
- ert fryntlig/ur og fyrikomandi.

Løn sbr. S&K.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bo Møller, deildarleiðara, tlf. 311320 ella 217593.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**FK**
Dr. Jacobsensgøta 4
boks 349 · 110 Tórshavn
**att.: Bo Møller**

## Lýsing

**um brævatkvøður og valkort til**

Vegleiðandi fólkaatkvøðu um samanlegging av Skála- og Runavíkar Kommunum, sum verður 8. oktober 2001.

Veljarar í Runavíkar Kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 5. oktober 2001. Tey, ið vegna sjúku ella av aðrari orsøk ikki kunnu koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 447035 í seinasta lagi 5. oktober 2001 kl. 15.00.

Valkort eru send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni (tlf. 447035) frá í seinasta lagi 5. oktober 2001.




Saltangará 2. oktober 2001
**Runavíkar Kommuna**

Víðkað skeið í

Navision Financials

Byrjar 10. Oktober

formula.fo
Skeið- og menningardeildin Tel.: +298 311115 · www.formula.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Restorffs ASSU